UTTAN ÚR HEIMI

# Vil sleppa úr Ísrael



Mordechai Vanunu vil hava Jens Stoltenberg at hjálpa sær at sleppa úr Ísrael

Mynd: Reuters

**Fyri aðru ferð hevur ísraelski kjarnorkuverkfrøðingurin Mordechai Vanunu biðið Noreg um hjálp til at sleppa av landinum**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri skjótt tveimum árum síðani bað Mordechai Vanunu táverandi norska forsætisráðharran, Kjell Magne Bondevik, hjálpa sær at sleppa úr Ísrael, men hann fekk ikki svar. Nú roynir hann aftur.

– Eg heiti inniliga á norsku stjórnina um at verja míni mannarættindi. Tí biðið eg tygum og stjórn tygara gera tykkara til, at ísraelska stjórnin letur meg sleppa av landinum, skrivar Vanunu í einum brævi til Jens Stoltenberg, forsætisráðharra.

Mordechai Vanuno sat í íosraelskum fongsli frá 1986 til 2004, tí hann hevði almannakunngjørt loyniligar upplýsingar um ísraelsku kjarnorkuvápnini. Sjálvt um hann varð latin leysur fyri tveimum árum síðani, hava myndugleikarnir framvegis sera strangt eftirlit við honum. Eitt nú hevur hann fingið forboð fyri at fara úr Ísrael, og hann hevur heldur ikki loyvi at tosa við útlendsk tíðindafólk.

# Fjølmiðlar skulu vísa størri varsemi

**ES heldur, at fjølmiðlarnir í Evropa skulu vísa størri varsemi, tá talan er um átrúnað**

SKRIVIFRÆLSI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Muhammedstekningarnar hjá Jyllandspostinum hava fingið fleiri at spyrja, um tali- og skrivifrælsið er óavmarkað og ófrávíkiligt. Í Danmark hevur Anders Fogh Rasmussen blankt víst aftur at biðja um almenna umbering fyri tekningarnar við teirri grundgeving, at tað stendur fjølmiðlunum frítt at siga og skriva tað, teimum lystir. Leiðslan í Jyllandspostinum hevur somu grundgeving fyri ikki at biðja um umbering fyri tekningarnar.

Nú hevur ES valt at taka spurningin upp. Kommiserurin í lógarmálum, italiumaðurin Franco Frattini, sigur við bretska blaðið The Daily Telegraph, at hann kundi hugsað sær eina reglu, sum eggjar fjølmiðlunum til at vísa serligt varsemi, tá teir umrøða átrúnað. Sjálvur heldur hann, at ein tílík skipan hevði verið ein týðandi politiskur boðskapur til tann muslimska heimin.

Men ES heldur fast um tali- og skrivifrælsið, og tí verður ikki talan um at áleggja fjølmiðlunum nakað í hesum sambandi. Tvørturímóti kunnu fjølmiðlarnir sjálvir velja, um teir vilja gera eftir nýggju regluni, sigur Franco Frattini við The Daily Telegraph.

# Victoria-vatnið minkar

**Uganda er í ferð við at tøma heimsins størsta vatn**

AFRIKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein nýggj kanning hjá ST hevur nú avdúkað, at heimsins størsta vatn, Vicroria-vatnið í Afrika, er minkað trý prosent tey bæði seinastu árini. Úrslitið er, at nógvar bygdir hava einki vatn longur, fiskifør bera við botn í heilum, og ferjur liggja strandaðar langt frá teimum gomlu bryggjunum.

Londini, sum eru kring Victoria-vatnið hava eina 60 ára gamla avtalu, sum ásetir, hvussu nógv vatn tey kunnu taka úr vatninum, men kanningin hjá ST kemur til ta niðuirstøðu, at Uganda brúkar nógv meiri vatn, enn tað kann sambært avtaluni. Daniel Kull, sum hevur staðið fyri kanningini, sigur við New Scientist magazine, at tey bæði seinastu árini hevur Uganda tikið umleið 55 prosent meiri vatn úr Victoria-vatninum, enn landið hevur loyvi til.

Orsøkin er eitt vatnorkuverk, sum Uganda bygdi fyri í 2002. Daniel Kull sigur, at longu stutt eftir at verkið varð tikið í brúk, fóru fólk at kæra seg um, at Victoria-vatnið var farið at minka. Nú hava kanningar so víst, at Victoria-vatnið hevur ikki verið so lítið seinastu 80 árini, sum tað er nú.

– Minkar vatnið meiri, fer tað at fáa álvarssamar avleiðingar, tí Victoria-vatnið er lívsgrundarlagið hjá umleið 30 milliónum fólkum, sigur Daniel Kull.

Victoria-vatnið ella Lake Victoria er 70.000 ferkilometrar stórt og er í Uganda, Kenya og Tanzania.

## Fuglakrím í Afrika

Fuglakrím er farið at gera um seg í Nigeria, og tað fær nú heimsheilsustovnin WHO til at mæla øðrum afrikonskum londum til at tilbúgva seg betur fyri at forða fyri, at sjúkan skal breiða seg.

Tað er nakað síðani, fuglakrímið bleiv staðfest í Nigeria, men ikki fyrr enn nú hava myndugleikarnir gjørt av at berja sjúkuna niður. Tær seinastu vikurnar eru umleið 100.000 høsn og aðrir búfuglar avlívaðir, men WHO heldur, at sjúkan kann fáa tíð til at breiða seg til onnur lond í Vesturafrika.

– Tað er einki at dylja yvir, at tey afrikonsku londini hava drálað ov leingi, og at okkurt má gerast nú. Sjúkan í Nigeria er ein stór hóttan ímóti bæði fólki og djórum, sigur aðalskrivarin í WHO, Lee Jong-wook, við AP.

## Útbúgvin fólk vælkomin

Franska stjórnin hevur samtykt eitt uppskot hjá Nicolas Sarkozy, innanríkisráðharra, sum hevur til endamáls at avmarkað talið á fremmandafólki, sum leita sær til Fraklands, samstundis sum tað verður truplari hjá fólki at fáa longt uppihaldsloyvi.

Eitt nú sigur uppskotið, at fremmandafólk, sum hava fingið uppihaldsloyvi, skulu læra seg franskt, áðrenn tey kunnu fáa loyvið longt. Talið á teimum, sum yvirhøvur fáa uppihaldsloyvi, skal eisini skerjast, og her miðjar stjórnin eftir, at fremmandafólk við útbúgving skulu hava ein fyrimun. Fremmandafólk, sum hava studentsprógv, skulu eisini sleppa til Fraklands at gera útbúgvingina lidna.

Dominique de Villepin, forsætisráðharri, leggur dent á, at ætlanin er ikki at taka læknar, verkfrøðingar og onnur við høgari útbúgving frá teimum fátæku londunum. Tvørturímóti ætlar stjórnin at eggja teimum flestu at fara heimaftur, tá útbúgvingin er liðug, sigur hann.

Tann sosialistiska andstøðan skuldsetir stjórnina fyri at skerja rættindini hjá teimum fremmandu, men stjórnin sigur tað vera neyðugt at avmarka talið á teimum, sum koma til landið.

## Til skips við skammbyrsu

Fyrrakvøldið varð løgreglan í Måløy í Noregi boðsend umborð á eitt fiskiskip, tí ein 30 ára gamal maður hevði hótt tveir av sínum skipsfeløgum við skammbyrsu.

Tá løgreglan kom umborð, hevði manningin tikið skammbyrsuna frá tí 30 ára gamla, og teir báðir, sum hann hevði hótt, vóru farnir í land. Løgreglan tók skammbyrsumannin við sær, og í dag skuldi hann í rættin til avhoyringar.

Løgreglan sigur, at tann 30 ára gamli maðurin hevur loyvi at hava vápn, men at tað er ógreitt, hví hann hevði tikið skammbyrsuna við sær umborð. Tað er eisini greitt, at hann verður sektaður, tí vit meta tað álvarssamt, at maður hóttir onnur við skammbyrsu, sigur løgregluovastin, Reinhardt Søgård, við Sunnmørsposten.

## Myrdi konu og dóttur

Tann 22. januar vórðu tann 27 ára gamla Rachel Entwistle og níggju mánaðar gamla dóttur hennara funnar myrdar í heimi teirra í USA. Nú er Ned Entwistle, maður Rachel og pápi ta lítlu gentuna, tikin og skuldsettur fyri at hava skotið tær.

Tær báðar fóru til gravar tann 1. februar, men Ned Entwistle var ikki og fylgdi teimum. Amerikanska løgreglan hevur fyrt sagt, at hann fór til Bretlands um tað mundið, tá konan og dótturin vórðu myrdar, og tí bleiv hann boðsendur til avhoyringar á amerikonsku sendistovuni í London fyrr í vikuni. Tað er ikki greitt, hvat kom fram undir avhoyringini, men løgreglan í Middlesex sigur við Reuters, at Ned Entwistle situr í varðhaldi har, og at hann er skuldsettur fyri morð.

Kenningar hanmsara siga við Sky News, at hann hevði fíggjarligar trupulleikar í Bretlandi. Tí gjørdi hann av at flyta til USA, men heldur ikki har hevði hann eydnuna við sær. Leysatíðindi vilja vera við, at hann fekst eisini við at selja porno á alnótini.